

**TOYOTA COROLLA 1,9 D TERRA SEDAN** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** AG 787 **KM:** 115.000
**Árgangur:** 09.06.00 **Seinast sýnaður:** 04.03.04
**Viðmerking:** El- rútar/spegl - Radio/CD - Sentrallás - Sera penur í lakkinum.
**Kr. 108.000,-**



**LEXUS IS 200 SPORT 6 Gear** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** TP 779 **KM:** 25.000
**Árgangur:** 05.09.02 **Seinast sýnaður:** 05.09.02
**Viðmerking:** Alufelgur - Klimaanlegg - El rútar - El spegl - Tónaðar rútar - Tokulyktir - El innstilling av setrum - Leður setur - Radio við bandspælara - Fløguboks 6 stk. -
**Kr. 279.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1,6 SOL H/B AUT Gear** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** VG 578 **KM:** 20.000
**Árgangur:** 14.09.00 **Seinast sýnaður:** 12.02.04
**Viðmerking:** Elrútar/spegl - Sentrallás - Aircondition - Radio/CD
**kr. 118.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2,0 SOL AUT. Gear** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** HB 140 **KM:** 65.000
**Árgangur:** 31.10.03 **Seinast sýnaður:** 31.10.03
**Viðmerking:** Fjarstýrt sentrallás - El-rútar aftan og framman - El-innst. spegl við aut innlegging - Regnsensor - Klima-anlegg - Radio/band/fløguspælara - Tokulyktir Hiti í setrum framman.
**Kr. 245.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 1,8 SEDAN SOL** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** ME 926 **KM:** 111.000
**Árgangur:** 26.03.98 **Seinast sýnaður:**
**Viðmerking:** Fjarstýrt sentrallás - El-rútar aftan og framman - Radio/bandspælara
**Kr. 96.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2,0 LINEA SOL STW AUT** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** UV 759 **KM:** 122.000
**Árgangur:** 27.06.02 **Seinast sýnaður:** 27.06.02
**Kr. 165.000,-**



**KIA SEPHIA 1,5 SEDAN**

**Skrásetingarnr.:** NJ 403 **KM:** 81.000
**Árgangur:** 19.05.98 **Seinast sýnaður:** 18.05.04
**Kr. 44.000,-**



**FIAT STILO 1,6** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** TJ 583 **KM:** 20.000
**Árgangur:** 11.07.02 **Seinast sýnaður:** 11.07.02
**Viðmerking:** Sentral lás - el rútar - el spegl - fløguspælara
**Kr. 128.000,-**



**VW GOLF 1,9 TD**

**Skrásetingarnr.:** FL 746 **KM:** 270.000
**Árgangur:** 11.09.92 **Seinast sýnaður:**
**Viðmerking:** Defektan motor - Stendur á søludeildini í Klaksvík
**Kr. 8.000,-**



**BMW 320 I**

**Skrásetingarnr.:** F 85082 **KM:**
**Árgangur:** 06.04.90 **Seinast sýnaður:**
**Viðmerking:** Motorur í ólagi, deilir fylgja við - Stendur á søludeildini í Klaksvík
**Kr. 8.000,-**

**6 mánaða garanti**

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

**REYNI SERVICE** P/F

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.




*Teir arbeiða við at fríðka um vegkantin við gjaldsstøðina hjá Vágatunlinum. Tríðja vegbreytin verður tikin burtur, og í næstum verður gjaldstøðin helst flutt inn í tunnilin at standa*

# Flyta gjaldstøðina inn í tunnilin

**Gjaldstøðin hjá Vágatunlinum verður í næstum flutt frá tunnilsmunnanum og inn í sjálvan tunnilin. Tað er fleiri ferðir komið fyri, at kavi hevur lagt seg á linsuna, so tólið ikki fær lisið av, hvørjir bilar koyra ígjøgnum**

FERÐSLA
*Edvard Joensen*

Gjaldstøðin hjá Vágatunlinum verður í næstum væntandi flutt inn í sjálvan tunnilin at standa. Hetta verður gjørt fyri at fáa støðina at virka meira optimalt, sigur stjórin fyri Vágatunnilin, Dávur Reinert Hansen.

Tað er komið fyri nakrar ferðir í vetur, at kavi er lagstur á linsuni á myndatólinum, sum avmyndar bilarnar, sum koyra gjøgnum tunnilin. Tá so er, fær tólið ikki lisið av, hvør bilurin er, sum fer ígjøgnum, og tískil kann heldur ikki sendast nøkur rokning fyri koyringina.

Hesum kann sleppast undan við at verja linsuna móti kava, sigur Dávur Reinert Hansen. Tað kann so annaðhvørt gerast við at leggja tak yvir støðina, ella flyta hana inn í tunnilin. Væntandi verður tann seinna loysnin vald, sigur hann.

Hann væntar ikki, at tað verða nakrir trupulleikar av at flyta støðina. Tað mesta av kaðalunum kann dragast gjøgnum teir bakkar, sum longu liggja undir loftinum, og lítið skal gravast fyri at festa støðina, sigur hann.

Í løtuni eru menn í ferð við at hampa økið við gjøldstøðin uttan fyri tunnilsmunnan, har tríðja koyribreytin varð. Hendan breytin verður tikin burtur, nú ikki verður kravt inn frá teimum, sum koyra uttan kubba ella aðra avtalaða skipan.

Tosað hevur verið um hvussu gerast skal við ferðskeltini, sum standa við støðina. Tey eru í grundini ikki neyðug, nú støðin bara er sjálvvirkandi, og einki bíðirað er eftir at sleppa at taka sær seðil við automatina.

Í meðal koyra umleið 1.00 bilar aftur og fram gjøgnum Vágatunnilin um samdøgurði, sigur Dávur Reinert Hansen. Men inntøkan frá teimum er heldur lægri enn í fjør, sigur hann. Tað kemst av, at summi gjøld eru lækkað. Eitt nú er nýtt árhalds sett á stovn frá 1. februar, og tað veru nógv nýtt.

Undirtøkan fyri tí haldinum hevur verið góð, sigur Dávur Reinert Hansen, og teir bilarnir, sum hava tað, koyra dúgliga gjøgnum tunnilin.

Árshaldið virkar soleiðis, at goldið verður kr. 1.000,- um mánan, og so kann ein koyra, sum einum lystir.

Tað koyra, sum vera man eisini útlendskir bilar gjøgnum tunnilin. Spurdur um, hvussu teir verða avroknaðir, sigur stjórin fyri Vágatunlinum, at tey fara at seta skelti upp við servicestøðirnar, har gjørt verður vart við, at har ber til at gjalda fyri at hava koyrt gjøgnum tunnilin. Eisini verða faldarar lagdir umborð á Norrönu og á flogvøllinum, har greitt verður frá hesi skipanini.

Fara útlendingar kortini av landinum uttan at hava goldið, er ætlanin at fáa eina skipan, har Vágatunnilin kann venda sær til bilaeftirlitini í ymsum londum og tann vegin krevja pengingin inn.

Stjórin heldur ikki, at tað hevði helst verið dýrari at havt fólk sitandi fast við tunnilin til at kravt bummgjald, enn tað møguliga kemur at kosta í mistum inntøkum frá útlendksum bilum.

Skulu vit hava mannaða gjaldstøð, tosa vit um eini sjey ársverk við vaktarskipanum, yvirtíð og slíkum. Og so stendur inntøkan frá útlenskum bilum helst ikki mát við tær útreiðslur, sum vit høvdu havt av at manna støðina, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri fyri Vágatunnilin.